


*Tær manna fyrsta føroyska gentubólkin nakrantíð, og ætlandi geva tær sína fyrstu fløgu út í november*



*Lars Lottrup er danmarksmeistari í eitthjólaðari súkkling. Nú kemur hann til Runavíkar at vísa síni kynstur*

# Ársins barna-og ungdómstiltak

**Mentanarvikan 2008 endar við ársins største og mest spennandi barna-og ungdómstiltaki í Føroyum. Hetta tiltak verður í Ítróttarhøllini í Runavík sunnudagin, 26. oktober**

Tað er vorðin siður at enda mentanarvikuna við einum stórum tiltaki, sum serliga er ætlað børnum.

- Í ár hava vit lagt okkum eftir at gera skránna so fjølbroytta og spennandi, at ung sum gomul skulu fáa eina heilt serliga upplivíng.

Fyrireikararnir halda, at eitt hitt mest forkunnuga, sum verður á barna-og ungdómstiltakinum, verður óivað danin Lars Lottrup, ið ikki er hvør sum helst.

## Eitthjólað súkkla

- Um tú ikki hevur hoyrt um hann, er tað allarhelst tí, at hann er sera torførur at fáa fatur á. Hann súklar undan tær á síni eitthjólaðu súklu, og hann hevur tað eisini fyri at goyma seg inni í einari stórari ballón.

Fyrireikararnir av mentanarvikuni vísa á, at Lars Lottrup er danmarksmeistari í eitthjólaðari súkkling, og hann hevur eisini undirhildið við stóru ballónini hjá sær í átta ár.

- Í Danmark er hann kendur frá Zirkus Nemo, og hann hevur ferðast víða um heimin, eitt nú í Kina og Amerika, umframt um meginpartin av Evropa.

## Faroe 5

Nýggi og vælumtókti gentubólkurin Faroe 5 verður eisini á pallinum. Tað eru Jónvá Ellingsgaard, Lillian Dalsgaard, Asta Højgaard, Ragnhild Dam og Vígdis Fjallstein, sum manna fyrsta føroyska gentubólkin nakrantíð.

Við hittunum "Bara 1 spæl" og "Tú fert altíð at vera har" hava tær longu sungið seg inn í hjørtuni á nógvum føroyingum, og ætlanin er, at tær fyrst í november mánaði skulu geva sína fyrstu fløgu út.

Dansigenturnar Katrin & Diana, sum eru tvær ungar toftagentur, ið hava gingið á dansiskúlanum Stepz í Keypmannahavn, fara eisini á pallin. Í Danmark hava tær lært tað nýggjasta nýggja innan dansiheimin, so fólk kunnu gleða seg at síggja tær á palli.

## Bassi er við

Eins og undanfarin ár verður Bassi eisini við í ár. Hann hevur altíð okkurt gott við til børnini.

Eir í Ólavsstovu og Lív Reinert Kjeld verða vertir á barna-og ungdómstiltakinum, sum verður í Runavík sunnudagin 26. oktober klokkan 17.

Tiltakið varar hálvanannan til tveir tímar og atgongumerkini, sum kosta 100 krónur, fáast við dyrnar frá klokkan 16.


# IRF – HEILT OG REINT

IRF er interkommunalur felagsskapur, ið veitir heildartænastur viðvíkjandi innsavning, viðgerð og burturbeining av burturkasti í limakommununum.

IRF leggur dent á umhvørvisvinaliga innsavning og viðgerð av burturkasti og er slóðbrótandi veitari av fjarhita til virksemið á Hagaleiti.

**VIRKISØKINI HJÁ IRF ERU Í HØVUÐSHEITUM:**

Burturkast at brenna
Papp, plast, jarn og metal at endurvinna
Køli- og frystiútbúnaður at endurvinna
Elektroniskur útbúnaður at endurvinna
Burturkast at tyrva
Serliga dálkandi burturkast
Spillolja og oljudálkað vatn
Rottangaevja

Sí meira um virksemi okkara á www.irf.fo

IRF

IRF · Hagaleiti · FO-520 Leirvík · tlf. 414243 · www.irf.fo

SENDISTOVAN